

*...lsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, heldur, at virksemisskapandi tiltøk hava størri týdning enn avlop*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# ...r afturat

gjørt fyri at økja um virksemið har.

Landsstýrið leggur ikki upp fyri lønarvøkstri næsta ár, tí hesar útreiðslur eru vaksnar nógv seinnu árini, og nú skal haldast aftur.

– Tað er betur at fáa meira virksemi við íløgum enn at vaksa um raksturin. Broytast búskaparligu útlitini, ber tað til at skerja íløgurnar, meðan tað vísir seg vera sera trupult at minka um raksturin, sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum.

### Tubbakið skal kosta meira

Landsstýrið fer at skjóta upp fyri løgtinginum, at punktgjaldið á tubbak hækkar, og tað fer at hava við sær ein vøkstur í prísinum á tubbaki á 10 prosent. Harafturat skal vektgjaldið á bilum upp, og her verður talan um ein vøkstur á næstan eina helvt.

Landsstýrið ætlar sær eisini at taka upp samráðingar við donsku stjórnina fyri at fáa renturútreiðslurnar hjá landskassanum niður. Hetta skal gerast við at fáa lægri rentu á skuldini til ríkiskassan, tí marknaðarrentan er væl lægri nú, enn rentan á hesari skuld varð ásett at verða í sínari tíð.

Landsstýrið hevur ikki tikið inntøkur fyri møguligar einskiljingar við í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006. Ætlanin er at fara undir einskiljingar, men í fyrstu syftu verður ikki roknað við inntøkur til landskassan av hesum næsta ár.

### Raðfestingar

Landsstýrið sigur, at í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2006 verða tey eldru, tey lesandi og heilsuverkið raðfest frammarliga. Í eldrarøktini verða fleiri nýggir stovnar tiknir í nýtslu, og raksturin verður hækkaður.

– Visjón 2015 er sett á dagsskrá, og í fíggjarlógaruppskotinum fara heili 23 prosent av løgunum til útbúgving. Serliga fólkaskúlarnir og miðnámsskúlarnir verða raðfestir høgt, sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum.

Hann sigur, at stórir árgangir frá fyrstu árunum í 90´unum eru á veg í miðnámsskúlan, og tí skal játtanin til hesar skúlar hækka, so at eitt vaksandi tal á næmingum kann takast inn. Í heilsuverkinum eru tað útreiðslurnar til sjúkrahúsverkið, sum vaksa mest, og 18 prosent av løgunum verða lagdar innan heilsu- og almannaøkið. Tað eru serliga framhaldandi um- og útbyggingar á Landssjúkrahúsinum, sum tað verða brúktir fleiri pengar til.

# Skattalættin heldur fram

**Aftur næsta ár fáa føroyingar skattalætta fyri 60 milliónir krónur. Enn er tað ikki gjørt av, hvussu skattalættin skal latast**

SKATTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Meðan landsstýrið stríðist við minkandi inntøkur og vaksandi útreiðslur, hevur tað framvegis funnið pláss fyri einum skattalætta í 2006.

Samgongan gjørdi eina avtalu um at veita skattalætta fyri 60 milliónir krónur í nøkur ár, og hóast búskaparligu útlitini ikki eru tey somu, sum tey hava verið, heldur landsstýrið fast um skattalættan.

Tað hava verið røddir frammi í samgonguni um, at skattalættin skuldi strikast, men serliga fólkaflokkurin hevur tvíhildið um, at skattalættin framvegis skal latast.

Og nú uppskotið til fíggjarlóg fyri 2006 er lagt fram, staðfestir landsstýrið, at tað framvegis eru ráð at lata skattalætta í 2006.

– Vit hava ikki enn gjørt av, hvussu vit fara at lata skattalættan, og møguliga verður hann latin øðrvísi enn seinast. Men tað verður ein lætti fyri 60 milliónir krónur, og nú fara vit at gera av, hvussu hann skal latast, sigur Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.

Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum sigur, at fólk koma ikki at merkja skattalættan á sama hátt næsta ár, sum tey gjørdu í ár, tí væntandi fer kommunuskatturin at hækka, og gjaldið til barsilsskipanina fer helst eisini at hækka.

– Vit leggja nú barnaforsorgina út á kommunurnar og barsilsskipanina út á arbeiðsmarknaðin, og tí er tað rætt at kompensera fyri hetta í landsskattinum. Um vit ikki lótu hendan skattalættan, so hevði tað í grundini merkt eina stóra skattahækking hjá fólki, sigur Bárður á Steig Nielsen.

Vil tað so siga, at tit nú brúka tær 60 milliónirnar, sum skuldu verða ein veruligur skattalætti, til at kompensera fyri , at eitt nú kommunuskatturin hækkar?

– Soleiðis haldi eg ikki, at tað ber til at siga. Vit veita ein skattalætta fyri 60 milliónir krónur, og samstundis leggja vit nøkur øki út til kommunurnar og arbeiðsmarknaðin. Vit ætla at gera skattalættan soleiðis, at øll fáa ein ágóða, sigur landsstýrismaðurin

# Tak koyrikortið upp á tvey vikuskifti

**Nú ber til hjá teimum, sum skulu upp til nýggja koyriroynd, at taka hetta upp á tvey vikuskifti á Hotel Vágum**

KOYRIKORT

Hevur tú mist koyrikortið ella skalt tú upp til nýggja teori- og koyriroynd. Og tímir tú ikki at brúka fleiri vikur ella mánaðir til hetta, so er Jóhannus Hammar, sum rekur Hammers Koyriskúla, aftur á vegnum við einum nýggjum tilboði.

Seinasta mánað skipaði hann fyri fyrstu ferð fyri vikuskiftisskeiði í bæði teori og koyring, og undirtøkan her var somikið góð, at hann ikki ivaðist í at bíleggja pláss til enn tvey vikuskifti.

– Vit hava pláss til eini 20 fólk á skeiðnum, og hesi vórðu fullsett alt fyri eitt seinast. Tí ivist eg ikki í, at tørvurin á fleiri slíkum skeiðum er stórur, sigur Jóhannes Hammer.

Og kostnaðurin fyri skeiðið tykist eisini vera rímiligur. Fyri 5.000 krónur fáa fólk morgunmat, gisting og frálæru innan bæði teori og koyring. So er bara sjálv próvtøkan eftir, men hon má so gerast hjá myndugleikunum.

Skeiðið verður hildið á Hotel Vágum leygardagin 1. oktober.